Framúrskarandi verk - vánalig framsýning

Listin er hugtakandi, áhugaverd – ja, framúrskarandi. Men innballingin er als ikki nøktandi, sigur Kinna Poulsen um framsýningina »Endurnýggjað Íslendsk Málningalist«

UMMÆLI
Kinna Poulsen

Í løtuni hongur ein ógvuliga áhugaverd framsýning í Listaskálanum í Havn, hvørs heitið er »Endurnýggjað Íslendsk Málningalist«. Her eru 5 listafólk umboðað og teirra verk hanga ávikavíst í gongini, í tí fyrstu pyramiduni og í salinum, ið verður nýttur til skiftandi framsýningar. Framsýningin er lutfalsliga væl upphongd, undantikið samansetingini millum Kristin Gunnlaugsdóttir og Odd Nerdrum, sum myndirnar hjá fyrstnevndu als ikki tola. Hennara dreymakendu náttúrutulkingar í akryl lýsa eitt stiliserað landslag við stórslignum fjøllum og tindum, ið gerast enn størri av teimum elasmáu trounum, steinunum o.ø. Møguliga ein áhugaverdur myndaheimur, men undir liðini á monumentala myrkrið Nerdrums, tóktust hesar myndir sum smá, munaleys glansibíløt. Nerdrum skuldi havt allan tann niðara partin av salinum fyri seg sjálvan, men hetta er sjálvandi lættari sagt enn gjørt, tá plássið er avmarkað.

Myrkur og ljós

Tigandi myndirnar hjá Georg Guðni Hauksson hanga væl fyri seg sjálvar í pyramiduni, ið gerst sum ein avbyrgd oyggj, ein meditativ oasa í heildini. Hauksson tekur støðið í íslendskari landslagsmálningatraditión, men bæði europeiskir romantikarar sum t.d. Caspar David Friedrich og amerikanskir modernistar sum t.d. Mark Rothko munnu vera granskaðir á leiðini. Hauksson hevur tríggir stórir oljumálningar við á framsýningini, ið at síggja til eru einfaldir og rættiliga líkir. Teir hava einki heiti og landslagið, sum tú sum áskoðari heldur teg bera kenslu á, verður myndað av eini vatnrættari striku miðskeiðis í myndaflatuni, ið verður fatað sum eitt slag av sjónarringi. Ikki skal nógv meira til fyrr enn vit halda okkum hóma eitt landslag. Í onkrari mynd er tað eisini sum um oyggjaskap verða hálvd í támi og mjørka og allastaðni er tað sum um okkurt er við at henda í møtinum millum myrkur og ljós.

Skagensmálarí

Myndirnar hjá Stéfan Boulter av fólkum og lutum minna í fyrsta umfari um heilt gamlar myndir frá tíðini, tá norðurlendsk listafólk tillagaðu impressionistisku lit- og ljósskrásetingina við tann eldra, idealiserandi málingarháttin. Men tá tú so hyggur eina løtu, gerst tú varug við tað meira modernaða stílblandið, sum Boulter m.a. man hava lært hjá Odd Nerdrum, sum var lærari hansara í nøkur ár. Boulter er uttan iva ávirkaður av læraranum, men teir eru øgiliga ymiskir eftir framsýningarmyndunum at døma. Boulter er fínligari og tykist ikki so beinleiðis vulgerur sum Nerdrum, men hann er heldur ikki (enn) eins áhugaverdur og tann eldri listamaðurin.

Magisk realisma

Huglagið í myndunum hjá Karolinu Lárusdóttir tykist heldur enn ikki suðuramerikanskt – magiskt-realistiskt - við afturvendandi blandinum millum eitt sosialrealistiskt sjónarmið við denti á felagsskap, samstarv, familjulív osfr. og tað óveruliga, symbolska, sum púra náttúrligt og uttan ørkymlan glíður inn í gerandisdagin, t.d. flúgvandi brúðarparið á la Chagall í myndini ”Brúdleyp”. Meginparturin av myndunum lýsa fleiri fólk, sum tykjast hyggja meira út úr myndini enn upp á hvønn annan. Myndirnar eru rættiliga líkar í bygnaði við 4-5 persónum í forgrundini, nøkrum fólkum í miðgrundini og antin einum útilandslagi ella einum inniladnslagi við hurðum, vindeygum, veggum í bakgrundini. Fólkini eru stór og trivalig við grefligum hondum, men tey eru als ikki so hugnalig sum tey tjúkku lívsstykkini hjá Botero. Í myndini ”Rabarbumaðurin” hyggja seks fólk út úr myndini, tey hava sama álvarsama, starandi og frávísandi andlitsbráið, eins og tey eru meinlík hvørjum øðrum á ein heldur ørkymlandi hátt. Myndirnar eru sum heild sera óhugnaligar, hóast vakra og fruktagóða umhvørvið. Eg kendi ikki hesa listakvinnuna frammanundan og var tí fegin um myndaskránna og møguleikan at fáa meira at vita um hennara verk. Her kundi eg lesa mær til um ta sosialu bakgrundina hjá listakvinnuni og um hvussu hon varð ummæld og dámd og nær hon bleiv kend. Ikki tað áhugaverdasta at lesa, heldur ikki tá komið verður fram til verkini: ”Í myndum hennara kemur fram tann boðskapur, at vit øll eru menniskju, og at vit eru, sum vit eru… Mannalívið, sum tað kemur fram í listaverkum hjá Kárulínu, er lívið hjá okkum øllum, og tað gleðir fólk at síggja tað endurspeglast í list hennara.”. Tekstinum vantar grundleggjandi upplýsingar um verkini, um stíl, komposition, myndamál, listarliga ávirkan osfr. Nær og hvussu kend fólk eru, er hinvegin ikki umráðandi at fáa at vita.

Vónbrot

Sum heild var tað eitt satt vónbrot at lesa katalogið, ið annars sær so fínt út við harðari permu og 50 síðum við myndum og tekstum á føroyskum, íslendskum og enskum. Onkur stirvin orðing er í føroysku týðingini og onkur beinleiðis villa, ið tykist vera ein misskiljing millum at endurnýta og endurnýggja. Longu tann fyrsti teksturin hjá savnsleiðaranum avdúkar eina vantandi fatan av hugskotinum aftan fyri framsýningina og tað absurd onkisigandi listfrøðingasitatið á enskum: ”If all goes well, the viewer will find himself in the world, that good artists are able to create” hjálpir ikki uppá støðuna. Teksturin við framsýningarheitinum leggur alt ov stóran dent á 19. og 20. øld og kemur ikki fram til ta sonevndu endurnýggjanina fyrr enn til allarsíðst í 10. síðstu reglu. Á vegnum verða nevnd øll møgulig rák, sum hava ávirkað íslendsku listina, men ikki eitt orð um eitt nú pop-art, sum eg annars helt vera eitt høvuðsrák við heimskendum íslendskum umboðum sum Erró.

Vantandi heild

Framsýningin er góð um hugsað verður um nøkur av hennara verkum, ið veruliga eru á høgum støði. Tá hugsað verður um heild, samanhang, hugskot og formidling er hetta ein vánalig framsýning og tað er spell